UTTAN ÚR HEIMI

## Veiðitjóvar ikki í havn

Norska deildin hjá umhvørvisverndarfelagsskapinum Green-peace er í øðini um, at tveir russiskir trolarar, sum eru undir illgruna fyri ólógliga veiði í Barentshavinum, sluppu at leggja at bryggju í Kirkenes í gjár. Talan er um trolararnar "Tobago" og "Mount Kent", sum báðir standa í svørtubók hjá norska fiskiveiðieftirlitinum.

Trude Gulowsen hjá Greenpeace sigur við Aftenposten, at útlendskir veiðitjóvar eiga ikki at sleppa í norska havn, og hesum tekur Reidar Nilsen í norska reiðarafelagnum undir við. Hann sigur við blaðið, at skip, sum ikki hava veiðiloyvi, eiga ikki at fáa nakra tænastu í norskum havnum.

Helga Pedersen, fiskimálaráðharri, sigur við NTB, at stjórnin leggur stóran dent á at steðga tí ólógliga fiskiskapinum í Barentshavinum, men at stjórnin kann ikki nokta útlendskum skipum at koma í havn í Noregi. Tað hevur stjórnin heilt einfalt ikki heimild til, sigur hon.

## Semja í Nepal

Í gjár eydnaðist tað loksins stjórnini í Nepal at semjast við teir maoistisku uppreistrarmenninar um vápnahvíld.

Tað merkir kortini ikki, at tað verður friður á tí politiska pallinum. Tvørturímóti hava sjey flokkar boðað frá, at teir fara at halda fram við stríðnum ímóti Gyanendra, kongi fyri at fáa demokratisk viðurskifti í landinum.

Gyanendra, kongur, hevur havt alt valdið í Nepal síðani 1. februar í fjør, tá hann koyrdi bæði stjórnina og tjóðartingið til hús, tí tey maktaðu ikki at fáa enda á bardøgunum við uppreistrarmenninar.

Stríðið ímillum nepalsku myndugleikarnar og uppreistrarmenninar hevur kostað meiri enn 13.000 mannalív.

## Charles óttast avdúkingar

Bretski trúnarvingurin, Charles prinsur, er í trongum skóm í hesum døgum, nú blaðið Mail on Sunday hevur boðað frá, at tað hevur avrit av einari dagbók, sum Charles skrivaði, tá hann var í Hongkong og vitjaði í 1997.

Mail on Sunday prentaði brot úr dagbókini longu í november í fjør, og har kom millum annað fram, at prinsurin hevði umrøtt týðandi kinesiskar diplomatar sum "andstyggiligar gamlar voksmyndir".

Tað eydnaðist prinsinum at fáa rættin at banna Mail on Sunday at prenta fleiri upplýsingar úr dagbókini. Men blaðið sigur seg eisini hava annað, sum Charles hevur skrivað í dagbók, og skal rætturin banna blaðnum at prenta tað, má Charles møta í rættinum sum vitni.

Men tað hevur Charles neyvan hug til. Sjálvur hevur hann sagt, at innihaldið í dagbókini var ætlað vinum og næstringum, men eitt av hansara starvsfólkum helt, at almenningurin átti at síggja innihaldið og gav Mail on Sunday avrit av tí.

## Lívshættislig umvending

At tað kann vera vandamikið at taka við aðrari trúgv er søgan um tann 41 ára gamla afghanan Abdul Rahman eitt dømi um.

Sum ungur drongur var hann muslimur, men tá hann sum 16 ára gamal fór at arbeiða hjá einum hjálparfelagsskapi í grannalandinum Pakistan, gjørdi hann av at taka við kristnari trúgv.

Hendan avgerðin fall ikki í góða jørð hjá skyldfólkinum hjá Abdul Rahman, og fyri trimum mánaðum síðani meldaðu tey hann til løgregluna. Hann bleiv tikin beinanvegin, og í morgin byrjar sjálvt rættarmálið ímóti honum. Sambært ákæruritinum er hann ákærdur fyri at hava vent islamsku trúnni bakið, og tað kann hann fáa deyðadóm fyri, skrivar tíðindastovan AP úr Kabul.

# Mótmæltu krígnum í Irak

**Í USA og Evropa gingu fólk mótmælisgongu á trý ára degnum fyri innrásina í Irak.**

IRAK-KRÍGGIÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

"Bush legg frá tær!" og "Hermenninir skulu úr Irak nú!" stóð millum annað at lesa á skeltum, sum mótmælisfólk gingu við í gøtunum í teimum flestu stóru amerikonsku býunum so sum New York, Washington, San Fransisco og Los Angeles um vikuskiftið í sambandi við trý ára dagin fyri innrásina.

Men fyrireikararnir fingu ikki ta undirtøku, teir høvdu roknað við, og undirtøkan var lítil, tá hugsað verður um, hvussu stórur partur av amerikanska fólkinum er ímóti politikkinum hjá George W. Bush, forseta og krígnum í Irak. Í Washington vóru mótmælisfólkini neyvan meiri enn 1.000 í tali, og í Hollywood vóru tey ikki meiri enn 1.200, sjálvt um fleiri kendir filmleikarar vóru uppií. Tann frægasta undirtøkan var á Times Square í New York.

Harafturímóti vóru mótmælisfólkini munandi fleiri á Trafalgar Square í London, har bretar mótmæltu krígnum, og í Rom vóru fleiri tíggjutúsund við í mótmælunum. Í Athen, Berlin, Istanbul, Keypmannahavn og Tokyo vóru eisini mótmælisgongur.

### Borgarakríggj

Sunnudagin legði fyrrverandi irakski forsætisráðharrin Iyad Allawi legði brenni á bálið, tá hann segði, at støðan í Irak er so spent nú, at í veruleikanum er talan um borgarakríggj.

– Tá millum 50 og 60 fólk doyggja í meðal um dagin, kunnu vit ikki kalla tað annað enn borgarakríggj, segði Allawi. Hann segði seg bera ótta fyri, at Irak fer í upploysn, og at tær víðgongdu átrúnaðarrørslurnar fara at fáa størri ávirkan í øllum Miðeystri.

Amerikanskir og bretskir talsmenn royndu alt fyri eitt at avsanna tey døpru orðini hjá Allawi. Bretski verjumálaráðharrin, John Reid, sum var í Irak í gjár, segði, at irakski herurin og hansara sameindu fara at basa teimum, sum royna at elva til borgarakríggj.

Summir eygleiðarar halda, at orðini hjá fyrrverandi irakska forsætisráðharranum hava samband við ta politisku støðuna í Irak, har tað vísir seg at vera sera trupult at skipa stjórn.



*Í USA fingu mótmælistiltøkini ímóti Irak-krígnum lítla undirtøku. Frægast var á Times Square í New York, haðani hendan myndin er.*

# Lukasjenko heldur fram

**Hvítarussiski forsetin, Aleksander Lukasjenko, fekk góð 82 prosent av atkvøðunum, men andstøðan viðurkennir ikki úrslitið.**

HVÍTARUSSLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Umleið 10.000 fólk mótmæltu í hvítarussiska høvuðsstaðnum Minsk í gjárkvøldið, eftir at valnevndin hevði kunngjørt, at Aleksander Lukasjenko var afturvaldur við 82,6 prosentum av atkvøðunum. Tey trý andstøðuvalevnini fingu sambært nevndini ávikavist 6,0, 3,5 og 2,6 prosent.

Andstøðan leggur myndugleikarnar undir valsvik, og í gjár varð roknað við, at teir útlendsku valeygleiðararnir fóru at koma við líknandi atfinningum. Andstøðan kærdi seg eisini um viðurskiftini undir sjálvum valstríðnum. Millum annað tók løgreglan fleiri hundrað stuðlar hjá andstøðuni, og eygleiðarar rokna við, at fleiri verða tikin afturat, so skjótt teir útlendsku eygleiðararnir eru farnir til hús.

Aleksander Lukasjenko hevur verið forseti í Hvítarusslandi síðani 1994. Seinni er grundlógin broytt, so nú er einki mark fyri, hvussu ofta ein forseti kann veljast aftur. Á tjóðartingsvalinum í 2004 fekk andstøðan ikki eitt einasta umboð á ting, men bæði ES og OSCE lýstu valið ódemokratiskt. Harafturat hava ES og USA skuldsett Hvítarussland fyri at bróta mannarættindini.


*Aleksander Lukasjenko.*